Ein sera spennandi dystur fyri áskoðaran. Nógv var upp á spæl, og tað sást eisini aftur á avrikunum hjá leikarunum, ið løgdu nógv fyri. Áskoðararnir fingu veruliga okkurt fyri pengarnar!

Tað er altíð keðiligt, tá ið tað verður rok rundanum dómaran eftir dystarlok. Petur Reinert dømdi ein fínan dyst, men tó var tað heldur løgið, at hann ikki legði meira enn teir tríggjar obligatorisku minuttirnar afturat vanligu leiktíðini. Fleiri steðgir vóru í spælinum, ið bendu á, at meira yvirtíð átti at verið givin.

ÍTRÓTTUR

AB ELLA HB? *Hvat hava Dimitrije Jankovic, Nikolaj Eriksen og Dion Splidt til felags? Jú, teir hava tað til felags, at teir eru teir einastu av teimum 11, sum byrjaðu inni hjá AB í gjár, ið ikki hava umboðað HB áður.*



Lukasz Cieslewicz (11) hevur júst skorað sigursmálið í avgerandi oddadystinum móti Víkingi

Myndir: Álvur Haraldsen

omanfyri, og afturat hesum burdi Vallerian eisini minkað um munin undan hálvleiksteðginum. Men bólturin vildi snøgt sagt ikki inn, og tí var hálvleiksstøðan 2-0.

Eftir hálvleiksteðgin var søgan tann sama. Fyrst brendi Mamuka risa møguleika, tá ið hann skallaði beint við síðuna av. Tað tyktist sum, at hetta ikki var dagurin, har FC Suðuroy fór at raka málið, men stutt eftir vísti liðskiparin hjá FC Suðuroy viðleikarum sínum, hvussu ein bóltur skal skjótast í netið.

Palli gekk á odda

Eftir 49 minuttir brast loksins fyri nev hjá útiliðnum. Búi Egilsson sendi innlegg innfyri úr vinstru. Bólturin hevði kós ímóti Palla Augustinussen við aftaru stong, ið stóð rættiliga fríur. Tað sá út til, at Palli hevði tíð til at taka bóltin niður, men ístaðin var liðskiparin eirindaleysur, tá ið hann heldur valdi at royna seg við einum fluktara. Hetta vísti seg at vera ein góð avgerð, tí at bólturin sang í netmeskunum aftanfyri Heðin Stenberg, ið var fullkomiliga prísgivin í støðuni. Eitt ómetaliga gott mál, og nú var FC Suðuroy við aftur í dystinum. Hetta var eisini fult uppiborið.

Allan dystin á tamb var Palli Augustinussen ein sannur brandur á miðuni hjá FC Suðuroy. Hann gekk á odda, júst sum ein liðskipari eigur at gera, og var hann besti maður á vøllinum.

Neyvleikin manglaði hjá FC Suðuroy

Tað tyktist sum, at málið til 1-2 veruliga fekk lív í bæði liðini. FC Suðuroy fekk enn meira áræði, og serliga vandamikið gjørdist tað stutt eftir málið hjá Palla, tá ið Búi Egilsson burdi javnað til 2-2. Hann skallaði tó uppum úr stuttari fjarstøðu.

Ígjøgnum tað mesta av seinna hálvleiki var tað FC Suðuroy, sum hevði rættiliga greiða, leikliga yvirvág. Bólturin var fyri tað mesta á hálvuni hjá AB, men trupulleikin hjá FC Suðuroy var, at teir ikki vóru nóg neyvir. Símun Samuelsen og Vallerian brendu báðir góðar málmøguleikar miðskeiðis í seinna hálvleiki, og eisini var Mamuka nær við at takkla bóltin í mál eftir trunkaspæl.

Stóra trýstið hjá FC Suðuroy bleiv tó linligari síðsta korterið. Orkan byrjaði at ganga undan hjá útiliðnum, sum hevði lagt nógv fyri at skora útjavnandi málið til 2-2. Hetta førdi til fleiri støður, har AB fekk fleiri mans framvið í snarálop, men ongantíð eydnaðist tað at skapa veruliga málmøguleikar burturúr hesum. Størstu málmøguleikarnar hjá AB í seinna hálvleiki hevði Tróndur Jensen við nøkrum vandamiklum langskotum.

FC Suðuroy fekk tó ein síðsta møguleika stutt undan dystarloki. Jón Krosslá kom at standa í sera góða skotstøðu í brotsteiginum hjá AB, men ógvuliga symptomatiskt fyri allar teir brendu málmøguleikarnar hjá FC Suðuroy, so skeyt hann bóltin langt uppum. Dysturin endaði 2-1 til AB.

Rok eftir dystarlok

Eftir dystarlok var tað týðiligt, at suðuroyingarnir vóru óndir, sum tað eitur á góðum suðuroyarmáli. Hetta gekk út yvir Petur Reinert, dómara, ið fekk nógvar skolur yvir seg frá misnøgdu taparunum úr FC Suðuroy. Hetta førdi við sær, at Høgni Madsen fekk reytt kort aftaná, at dysturin var avblástur.

– Eg havi sum so onga viðmerking til tað, sum hendi eftir dystin. Eftir mínum tykki hevði dómarin ein ringan dag, men eg eigi sjálvur at vera meira rutineraður enn so, at eg ikki leypi fram av á ein slíkan hátt. Tað var í lagi, at eg fekk reytt kort, sigur Høgni Madsen í samrøðu við Sosialin.

Tað líkist einari niðurflyting

Úrslitið merkir, at tað sær ógvuliga svart út hjá FC Suðuroy í niðurflytingarstríðnum. Gamaní er frástøðan til AB bara trý stig, men tað skal eisini havast í huga, at AB hevur nógv betri málmun enn FC Suðuroy. Tískil skal FC Suðuroy hála fýra stig inn á AB upp á tríggjar dystir. Hetta verður sera ringt, tí at tveir av dystunum hjá FC Suðuroy eru á útivølli ímóti liðum úr ovaru helvtini. Í komandi viku skulu suðuroyingarnir til Gøtu at spæla ímóti Vìkingi, meðan HB tekur ímóti í Gundadali í seinasta leikumfari.

Fyri AB merkir úrslitið, at nú er líkt til, at tað aftur verður Effofótbóltur úti á Argjum í 2016. Júst sum í 2013 er Sámal Erik Hentze á veg at bjarga argjamonnum frá einari hóttandi niðurflyting, og eigur hann stóran heiður fyri úrslitini, ið hann hevur fingið við AB. Í komandi leikumfari tekur AB ímóti ÍF á heimavølli. Vinnur AB hendan dystin, so er tað ómetaliga nógv, ið skal ganga galið, um Argir ikki skal hava umboðan í landsins fremstu fótbóltsrøð í komandi kappingarári.

neli@sosialurin.fo

AB - FC Suðuroy 2-1 (2-0)

1-0: Dion Splidt 17.
2-0: Dion Splidt br 29.
2-1: Palli Augustinussen 50.
Dómari: Petur Reinert

AB: Heðin Stenberg – Sørin N. Samuelsen, Rói Danielsen, Dmitrije Jankovic, Magnus Egilsson Álvur F. Christiansen, 54.) – Kári Nielsen, Tróndur Jensen – Dion B. Splidt 🟨 (Jobin Drangastein, 37. 🟨), Kristin R. Mouritsen, Rógvi Poulsen 🟨 – Nicolaj L. Eriksen (Jógvan Skeel Nolsøe, 78.)
FC Suðuroy: Kári Jacobsen – Dánial Godtfred 🟨, Vallerian Lobashvili, Christian Ibeagha, Heri Kjærbo 🟨 – Høgni Madsen 🟨🟥 – Salmundur Bech (Jón Krosslá Poulsen, 58.), Palli Augustinussen, Búi Egilsson (John Villi Leo, 85.), Símun Samuelsen – Mamuka Toronjadze

1 til 6

SPÆLARAMETING

3 KÁRI JACOBSEN
Átti ikki lut í málunum. Í summum førum hevði hann trupulleikar í deyðbóltsstøðum, men tó fær hann pluss fyri nógv góð útspørk, ið stundum førdu til vandastøður í hinum endanum.

3 DÁNJAL GODTFRED
Gott avrik av unga høgra bakkinum, ið hevði nógvar góðar takklingar í verjuni og eisini kom framvið av og á. Tó telur tað niður, at hann gjørdi eitt heldur óneyðugt fríspark, sum førdi til fyrsta málið hjá AB.

4 VALERIAN IOBASHVILI
FC Suðuroy hevur eina krútsterka miðverju. Valerian var stinnur í verjuni og eisini sera vandamikil í deyðbóltsstøðum. Tó var tað ov vánaligt av honum, at hann ikki skoraði nakað mál í hesum støðum, tí at hann hevði eini tríggjar stórar málmøguleikar.

4 CHRISTIAN IBEAGHA
Eins stinnur sum Valerian í miðverjuni, har AB ikki slapp ígjøgnum til nógv. Kropsliga eru miðverjarnir serstakliga væl fyri, og hetta gevur teimum ein fyrimun í mun til flestu aðrar leikarar í Effodeildini.

2 HERI KJÆRBO
Avrikið var á einari góðari leið, men tað telur nógv niður, at hann framdi brotsgerðina til brotssparkið, tá ið hondin var á skeivum stað.

3 HØGNI MADSEN
Stóð sterkur í myndini á miðvøllinum, og sparkaði hann eisini nógvar góðar deyðbóltar, ið burdu givið mál upp á okkurt tíðspunkt. Telur tó niður, at hann fekk sær eitt fullkomiliga óneyðugt reytt kort eftir dystarlok.

5 PALLI AUGUSTINUSSEN (DAGSINS LEIKARI)
Liðskiparin var ein sannur brandur hjá FC Suðuroy. Gekk á odda fyri sítt lið allan dystin á tamb, vann eina rúgvu av bóltum, og so skoraði eisini eitt framúr gott mál við rimmar fluktara.

2 SALMUNDUR BECH
Í mun til aðrar leikarar hjá FC Suðuroy stóð Salmundur eitt sindur ósjónligur í myndini í gjár. Varð útskiftur eftir lítlan tíma.

3 BÚI EGILSSON
Legði upp til málið hjá Palla og hevði nógv góð frambrot í høgru síðu. Tó manglaði tað ofta tað allar seinasta hjá honum, og eisini brendi hann ein rimmar kjans, har hann burdi skorað.

3 SÍMUN SAMUELSEN
Ikki tann sami leikarin sum áður. Gjørdi óneyðugar feilir til tíðir, men kom eisini fram til fleiri málkjansir, ið kundu ført til mál.

3 MAMUKA TORONJADZE
Rann ómetaliga nógv og kom eisini fram til fleiri málmøguleikar. Men neyvleikin manglaði, og tað kostaði liðnum dýrt.

2 JÓN K. POULSEN
Var inni seinasta hálva tíman. Hann fekk tó ikki nóg nógv burturúr, og eisini brendi hann ein stóran málmøguleika, har hann skeyt langt uppum.

JOHN VILLI LEO
Ov stutt inni at fáa eina meting.